## Thygesen aftur í FCM

Fyri hálvum øðrum ári síðan valdi lyklaleikarin hjá FC Midtjylland, Mikkel Thygesen, at skifta til týskan fótbólt. Æventýrið í týsku Bundesliguni gjørdist tó stokkut, tí longu nú hevur Thygesen valt at fara heimaftur til FC Midtjylland. Hann megnaði ongantíð at bíta seg veruliga fastan á liðið, og tá ið felagið eisini varð flutt niður, valdi hann at flúgva heim í reiðrið.



## Hargreaves komin til Manchester

Owen Hargreaves, sum fyri einum mánaða síðan skifti til Manchester United, varð í gjár kunngjørdur sum nýggjur leikari í felagnum. Samstundis varð prísurin almannakungjørdur. Miðvallarin kostaði Manchester United góðar 200 milliónir, og talan er um ein fýra ára sáttmála. Hargreaves kom til enska meistarafelagið eftir at felagið hevði verið í sera drúgvum samráðingum við nú fyrrverandi felag hansara, Bayern München.

# heiðursmerki




*Føroyska finalan endaði við, at Alex Joensen í hvítum vann á Jógvan Páll Kristiansen í bláum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Christoffur Olsen til høgru vann silvur hjá monnum undir 60 kg*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

venur judolandsliðið. Hansara fyrsti dystur var ikki stuttur, men Búgvi hevði fullkomið tamarhald á støðuni alla tíðina. Hann legði út við einum koka, fekk mannin í haldigreb og endaði so við einum hipon-kasti, og so var maðurin frá Rhodos liðugur.

Næsti dysturin var ímóti einum frá Guernsey, og har stýrdi Búgvi eisini dystinum og sendi mótstøðumannin út við hipon, eftir at hann framman undan vunnið eina wazari.

Í triðja dystinum stóð Sarema á skránni. Hetta var dysturin um finalusessin, og hann tryggjaði Búgvi sær eftir at hava strangulerað mannin.

Í finaluni bíðaði ein maður frá Prince Edvard Island. Hesin var ikki hvør sum helst, tí higartil í ár hevur hann bart fleiri enn 30 altjóða kappingar. Búgvi megnaði tó at geva honum ein skarpan gang í finaluni, men at enda lúrdi hann Búgva av og sendi hann niður í mottuna.

### Bronsa í –90

Petur Sigurð Johannesen og Edvard Johannesen frá ávíkavist Norðskála og Oyrarbakka, luttóku í –90 kg. Báðir vunnu teir sínar dystir skjótt og trygt. Í næsta dysti teirra var støðan øvugt. Teir taptu og komu soleiðis at spæla hvør sína bronsufinalu.

Petur Sigurð átti Gibraltar og vann trygt eftir stuttan Edvard gekk straks verri, tí eftir fáum sekundum hevði tað eydnast mótstøðumanninum at syft hann í gólvið til eitt flott hipon, og soleiðis misti hann bronsuna.

### Ragnar og finnin

Síðstu finaluna bardist Ragnar við Streym. Hetta var ímóti einum sterkum álendingini, sum eisini umboðar finska landsliðið, og skal við á komandi olympisku leikirnar. Hesin vann rímiliga trygt á Ragnar, eftir at hann hevði roynt seg við kasti og síðani fekk hann í haldigreb.

Dystirnar inntil tá hevði Ragnar hølvað seg fram í finaluna. Fyrsti mótstøðumaðurin varð sendur út við einum "flúgvandi-japanara", og næsti maðurin reyk eisini tíðliga eftir frálíkt hipon-kast.

Men tað bleiv rakk tó ikki til meiri enn eina silvurmedalju hjá Ragnar við Streym. Eitt úrslit, sum hann tó saktans kann vera errin av, eins og Christoffur Olsen, Jógvan Páll Kristiansen og Hjalmar Johannesen eisini kunna, á sama sum Alex Joensen og Petur Sigurð Johannesen eiga at vera ernir av sínum úrslitum.

### FAKTA UM JUDO

Kappast verður um stig, og fyri at vinna ein dyst er kravið tíggju av slagnum. Stigini verða givin út frá hvussu væleydnað køstini eru. Koka er tað lægsta, ið givið verður fyri kast, og svarar tað til 1 stig. Síðani kemur yoku, ið svara til 3 stig. Wazari er næsthægst og er tað sama sum 7 stig, og at enda kemur hipon, sum er 10 stig og verður givið, tá kastið er fullkomið.

Haraftrat ber til at vinna við at halda mótstøðuleikara sín niðri á gólvinum í 30 sekund, ella við at strangulera hann, soleiðis at hann noyðist at yvirgeva seg.

Hvør dystur kann vara upp til fimm minuttir, men endar sum annar av íðkarunum hevur fingið 10 stig.